## Betri eftirlit við bústaðarbygging



Sýns- og metingarskráir vísa, at neyðugt er at herða eftirlitið við bústaðarbygging í høvuðsstaðarkommununi. Torkilsgøtu og Jørundargøtu í Hoyvík eru meiri enn 30 sýns- og metingarskráir skrivaðar, og niðurstøðan er, at húsini eru ikki gjørd eftir forskriftunum, og tí er fuktur í teimum. Á Dýrindalsvegi er øll bygging steðgað fyribils, eftir at ein sýns- og metingarskrá sáar iva um, hvørt arbeiðið er gjørt eftir forskriftunum. Byggifyritøkurnar Articon og J&K Petersen, sum hava arbeiðið á Dýrindalsvegi um hendi, bíða nú eftir boðum frá umsitingini hjá kommununi. Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur við Útvarpið, at ikki dugir at siga, hvussu nógv byggingin verður seinkað.

## Vitjan úr Ísrael

Um seks dagar fáa Ísraelsfelagið og felagið Vinir Ísraels í Føroyum áhugaverda vitjan út Ísrael. Tað er leiðarin í Skandinavisku Sjómanskirkjuni í Haifa, Gro Wenske, sum kemur til Føroya 30. august at greiða frá um Ísrael, jødunum og um støðuna í landinum nú. Gro Wenske, sum er útbúgvin gudfrøðingur, er norsk og hevur búð í Ísrael í 40 ár. Hon hevur altíð havt stóran áhuga fyri landinum og fólkinum har. Hon hevur ferðast nógvastaðni kring heimin og hildið fyrilestrar um Ísrael og Miðeystur. Norska kvinnan er blaðstjóri á »Israels Røst« sum roynir at greiða frá um Bíbliuna og Ísrael og virkar fyri góðum samskifti millum jødar og kristin.

# Anni á Hædd leggur frá sær



*Nýggi stjórin á MRCC, Anni á Hædd, kom bert at sita eitt ár í sessinum. Stjórin hevur nú boðað frá, at hon leggur frá sær, tí hon tekur kanningina av stovninum, sum Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, ætlar at seta í verk, sum eitt misálit á seg sum stjóra*

**Landsstýrismaðurin í tilbúgvingarmálum hevur ikki álit á Tilbúgvingarstovninum og MRCC Tórshavn, og tí hevur hann avgjørt at seta eina kanning í verk at kanna um alt fór rætt fram á MRCC Tórshavn, tá russiski trolarin "OLSHANA" fór á Flesjarnar fyri trimum vikum síðani. Stjórin á Tilbúgvingarstovninum hevur tikið misálitið til eftirtektar og sagt seg úr starvi, hóast aðalstjórin heitti á hana um at vera sitandi**

TÍÐINDASKRIV

Mikudagin fekk stjórin á Tilbúgvingarstovninum, Anni á Hædd, at vita frá aðalstjóranum í Fiskimálaráðnum, at landsstýrismaðurin hevði avgjørt at seta eina kanning í verk fyri at fáa staðfest, um alt fór rætt fram á MRCC Tórshavn, tá russiski trolarin »OLSHANA«» rendi á Flesjarnar 2. august. Avgerðina um kanning hevur landsstýrismaðurin tikið, hóast Tilbúgvingarstovnurin staðiliga hevur frámælt einari kanning afturat teimum eftirmetingum, ið longu eru gjørdar. Sambært eftirmetingunum er tað onki, sum bendir á, at MRCC Tórshavn gjørdi nakað skeivt, tá manningin varð bjargað av skipinum. At bjarga fólkum, ið koma illa fyri á sjónum, er einasta ábyrgdarøki hjá MRCC Tórshavn, og henda uppgáva varð røkt til fulnar.

At landsstýrismaðurin ikki hevur álit á sínum stjóra og umsiting er sera óheppið og er eitt stórt bakkast fyri MRCC Tórshavn, sum fyri bara tveimum árum síðani varð eftirkannað av Det Norske Veritas eftir syndarligu Jøkulfell-vanlukkuna. At landsstýrismaðurin setur fram krav um kanning hevur við sær, at arbeiðsumstøðurnar gerast ótolandi á MRCC Tórshavn og Tilbúgvingarstovninum, tí avgerðin hjá landsstýrismannin letur upp fyri, at MRCC Tórshavn skal kannast, hvørja ferð óhapp henda á sjónum.

Kravið um kanning er einasta orsøk til, at stjórin hevur sagt seg úr starvi. Fráfarni stjórin hevur ikki fingið upplýst, hvørja fakliga meting landsstýrismaðurin byggir sína avgerð um kanning á. Fráfarni stjórin metir avgerðina hjá landsstýrismanninum verða ódámliga og niðurbrótandi fyri Tilbúgvingarstovnin sum heild, og serliga niðurbrótandi fyri MRCC Tórshavn, sum bert hevur fimm ár á baki og longu nú skal kannast fyri aðru ferð. Stjórin metir, at framferðin hjá landsstýrismanninum er óbúgvin og ein stór hóttan ímóti føroysku tilbúgvingini. Slíkar avgerðir føra til, at umsitingin missir álitið á politiska myndugleikan.

Fráfarni stjórin harmast um, at hon ikki megnaði at sláa ígjøgnum hjá landsstýrismanninum og harvið verja síni starvsfólk móti enn einari kanning. Arbeiðsfriður og tryggleiki eru avgerandi fortreytir fyri, at MRCC Tórshavn eisini næstu ferð skal verða ført fyri at taka tær røttu avgerðirnar, tá á stendur, skrivar fráfarandi stjórin, Anni á Hædd, í tíðindaskrivi.

# Fekk lina revsing fyri harðskap

**Ein ungur drongur fekk ikki so harða revsing, sum hann kundi fingið, tá hann í gjár fekk dóm fyri harðskap**

HARÐSKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ein ungur drongur slapp nokk so væl, tá ið hann í gjár varð dømdur fyri harðskap.

Hann var ákærdur fyri harðskap av serliga ráum og grovum slagi, tí sambært løgregluni vóru hann og nakrir vinmenn lagstir á ein annan ungan drong eina náttina uttanfyri eidd dansihøli í Havn.

Eftir at ein drongur varð feldur og lá svímaður í asfaltinum, stóðu ákærdi og nakrir aðrir rundanum hann og sparkaðu hann fleiri ferðir í høvdið og á kroppin.

Offrið slapp kortini væl og fekk bara smávegis skaða og varð eymur í andlitinum, tó at lækni metti, at hann kundi verða sálarliga ávirkaður av tí í eina tíð.

Tann akærdi noktaði seg sekan. Tvørturímóti greiddi hann frá, at hann hevði sæð, at ein annar hevði felt drongin og hevði gjørt seg kláran at herja á hann aftur, har hann lá í óviti á asfaltinum.

Fyri at forða fyri, at meiri harðskapi, tók hann drongin, sum ætlaði at leypa á, og fekk hann burturfrá, so at tað ikki hendi størri skaði.

Fleiri vitni greiddi frá tí tey sóu í rættinum. Nøkur vitnaði stuðlaði uppundir ákæruna hjá løgregluni og onnur stuðlaði frágreiðingini hjá ákærda.

Tá ið avtornaði, metti dómarin ikki, at talan var um harðskap av serliga ráum og grovum slagi. Hann metti ikki, at tað kundi ávísast, at ákærdi hevði sparkað drongin í høvdið. Men dómarin helt, at ongin ivi var um, at ákærdi hevði sparka drongin nakrar ferðir á kroppin.

Av tí sama varð drongurin dømdur 30 daga treytaða fongsulsrevsing við eini royndartíð upp á tvey ár.

Tað merkir, at ger drongurin nakað revsivert tey næstu tvey árini, skal hann sita teir 30 dagarnar, umframt dómin hann fær fyri tey nýggju lógarbrotini.

Undir vanligum umstøðum hevði dómurin verið harðari og ákærdi hevði ikki sloppið undan at siti.

Eitt dømi er, at ein knýttur nevi í andlitið kostar vanliga 30 dagar handan rimar og tað er dýrari at spakra liggjandi fólk.

Tá ið dómurin var lutfalsliga linur, var tað tí, at dómarin legði dent á fleiri ymisk viðurskifti.

Eitt var, at ákærdi var undir 18 ár, tá ið lógarbrotið varð framt. Hann legði eisini dent á, at ákærdi hevði ikki aftur verið í holt við løgregluna síðani hesa hendingina og at hansara persónligu viðurskifti vóru góð. Og so legði dómarin eisini dent á, at mansskaðin var bara lítil og ongin.